# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Grønland móti nýggjum tíðum

IA vann grønlendska valið. Flokkurin fekk 43,7% av atkvøðunum og gjørdist størsti flokkur. Stóri taparin var Siumut, sum meira ella minni hevur sitið við valdinum í Grønlandi seinastu ártíggjuni. Alt bendir á, at Grønland stendur frammanfyri einum veruligum politiskum siðaskifti fyri ikki at siga eini kollvelting. Við IA og formanninum Kupik Kleist tekur eitt tilvitað, ungt og sera vælútbúgvið ættarlið við politiska valdinum. Hetta hendir samstundis sum Grønland fer frá heimastýri til sjálvstýri. Politiska stjórnarlagsskiftið við nýggju sjálvstýrislógini gevur grønlendsku tjóðini sjálvsavgerðarrættin, og valúrslitið saman við valsiginum hjá IA kann tí væl gerast byrjanin til endan á donskum yvirvaldi í Grønlandi.

Við Kupik Kleist hevur grønlendska tjóðin fingið framúrskarandi og karismatiskan leiðara, sum uttan iva hevur førleikarnar til at standa á odda í tí stóru byltingar- og broytingartilgongd, sum nú byrjar í Grønlandi. Danir fáa uttan iva aðra bók at lesa í og sama er um aðar samstarvspartar at siga. Kupik Kleist hevur rikið eitt valskipað, hugsjónarríkt og Obamakent valstríð. Hann hevur givið ungdóminum nýggjar vónir um veruligar broytingar. Hann hevur givið ungu ættarliðunum vónir um, at nú skulu grønlendingar veruliga sjálvir taka ábyrgd av egnum lívi, egnari lagnu og egnum landi. IA er ideologiskt ein vinstraflokkur og verður vanliga samanborin við SF í Danmark. Í tjóðskaparspurninginum kann flokkurin samanberast við okkara Tjóðveldi, og hevur uttan iva eisini fingið íblástur frá nýggja Tjóðveldinum. Men flokkurin er annað og meira. Hann er ein flokkur, sum eisini tekur støði í tí upprunaligu og sterku inuitmentan, sum eyðkendi fólkið í Grønlandi, tá dansk norska kongsríkið í 1700 talinum tók Grønland sum hjáland.

Alt hetta merkir sostatt ikki bert, at Grønland nú fer gjøgnum eina nútímanstilgongd, sum er sera hart tiltrongd. Hetta merkir eisini, at grønlendska stjórnin fær eina lyklastøðu í stríðnum hjá norðuramerikansku inuittunum fyri politiskum frælsi og sosialum og búskaparligum rættvísi. Hesar tjóðir hava als ikki somu rættindi sum eitt nú Grønland fær við sjálvstýrislógini. Veruliga politiska valdið er í Washington ella í Ottawa. Fyri hesar tjóðir hevur valsigur IA ómetaliga stóran ímyndaligan týdning. Hetta merkir so eisini, at Grønland fær lyklastøðu í Útnorði, í Norðurlondum og í altjóðasamfelagnum.

Grønland hevur sterka og ríka mentan, og Grønland er ríkt til ráevni í náttúruni. Landið hevur stóran strategiskan týdning fyri USA og Danmark og hava tey fingið nakað at hugsa um eftir valúrslitið. Kupik Kleist fer helst at gagnnýta hesa støðu, og hann fer at nýta hana til at seta ferð á nútímansgerðina við støði í egnum fortreytum. Hetta merkir, at hann fer at virka fyri støðugt øktum sjálvstýri, fyri størri sosialum og búskaparligum rættvísi og fyri, at Grønland skal megna at taka sítt væl uppiborna pláss í altjóðasamfelagnum. Grønlendska valið hevur givið øllum og ikki minst føroyingum nakað at hugsa um. Vit hava allar orsøkir til at ynskja frændatjóðini í Útnorði tillukku. Sosialurin fer mánadagin at hava viðmerkingar til valið frá floksformonnum.

**Sosialurin**

## Aftursvar um manglandi útbering

SOFUS CLEMENTSEN
Stjóri, Vegna Postverk Føroya



Í bløðunum um Hvítusunnuna hevði Jóna Mortensen lesarabræv undir heitinum “Til Postverk Føroya - Hugsið tykkum um!”. Sum stjóri á Postverki Føroya vil eg fegin takka Jónu fyri lesarabrævið.

Á Postverki Føroya eru vit í støðugari tilgongd at menna okkum og betra okkara tænastustøði, í hesum sambandi eru afturmeldingar frá viðskiftafólki alneyðugar.

Hendingin, ið Jóna Mortensen umrøður, er ein óheppin hending, og vit á Postverki Føroya harmast um, at foreldur hennara kenna seg ørkymlað av okkara ávum. Tað hevur á ongan hátt verið ætlanin. Tað eigur sjálvandi ikki at vera so, at okkara eldru viðskiftafólk ikki fáa postin og heldur ikki fáa greið boð um, hví so er, tá tey seta seg í samband við okkum.

Postverk Føroya er í løtuni í holt við eitt stórt átak fyri at fáa skil á adresseringini í Føroyum. Hetta er fyri okkum eitt týdningarmikið átak. Tíanverri kemur tað alt ov ofta fyri, at brøv hava skeiva ella manglandi bústaðaráskrift. Hetta ger arbeiðið hjá okkara starvsfólki sera torført, umframt at tað kostar Postverki Føroya nógvan pening.

Partur av hesum átaki snýr seg um, at fáa allar føroyingar at hava navnaskelti á postkassanum. Tað er í hesum sambandi, at foreldrini hjá Jónu er komin í keðiligu støðuna. Vit sendu herfyri kunning í øll hús, at navnaskelti nú varð eitt krav. Nógv hava sjálvandi longu sett navnaskelti upp, men tey, ið ikki hava sett skeltið upp, fáa ikki longur postin bornan út. Hetta tykist kanska fýrkantað, men er neyðugt, fyri at fáa viðurskiftini í rættlag.

Tað er tó ikki okkara ætlan, at eldri fólk og fólk við skerdum førleika, skulu koma í klemmu. Tí bjóðar Postverk Føroya sær at seta navnaskelti upp fyri tey, ið ynskja tað. Hetta skuldu foreldrini hjá Jónu havt fingið boð um, tá tey ringdu til okkara. Men vit mugu her staðfesta, at kunningin ikki hevur verið nóg góð, og tað er harmiligt.

Fyri at tryggja, at onnur ikki koma í somu støðu, verður ein innanhýsis kunning send í dag, har vit minna okkara starvsfólk á hvussu týdningarmikið tað er, at kunna viðskiftafólkið væl og fortelja teimum, hvørjar møguleikar tey hava.

## Fyrimyndarvallóg okkara

ZAKARIAS WANG



Tá løgtingið samtykti, at uppstillingardømini hjá okkum skuldu avtakast, soleiðis at bygdirnar ikki longur skuldu sleppa at hava ávirkan á, hvør ið kom á ting, var tað grønlendska vallógin, sum var fyrimyndin hjá tingmeirilutanum.

Nú var val í Grønlandi 2. juni, og har sóu vit eina harmuliga avleiðing av okkara vallógum.

Teir flokkar, sum hava stýrt, hava mist fólksins álit, og andstøðuflokkurin IA gjørdist dupult so stórur og fekk 44% av atkvøðunum. Men hann vantar tveir tingsessir í at hava meiriluta.

Nú er einki, ið forðar taparaflokkunum at gera eitt landsstýri, har vinnaraflokkurin ikki er við. Sjálvandi er hetta ikki serliga sannlíkt, men undir øllum umstøðum verður neyðugt hjá IA, at fáa onkrar av teimum flokkunum við, sum hava mist fólksins álit og eru afturfarnir.

Slíkt kemur ikki fyri í teimum stóru demokratiinum sum India, USA ella Bretlandi. Har høvdu 44% av atkvøðunum tryggjað, at ein flokkur fekk reinan meiriluta einsamallur og kundi seta tað í verk, sum hann var farin til val uppá og hevði lovað veljarunum at fáa í lag. Sveik hann so lyfti síni, kundu veljararnir á næsta vali revsað hann við at sett hann frá, so hann aftur kom í minniluta.

Hetta er eitt demokratiskt krav.

Hetta krav lýkur tann vallóg ikki, sum ein løgtingsmeiriluta skrumblaði ígjøgnum í tinginum – uttan at spyrja veljararnar eftir – beint fyri síðsta val.

## Fólkaheilsuráðið takkar

*Tíðindaskriv*

Fólkaheilsuráðið takkar øllum - fólkum, fyritøkum og miðlum – sum tóku lut í Útivikuni.

Málini við Útivikuni vóru nøkur

**1**. At røkka øllum, ikki minst teimum, ið vanliga ikki røra seg.

**2**. At fáa so nógvar fyritøkur, stovnar og kommunur sum gjørligt við í tiltakið.

**3**. At fáa fokus á bilnýtsluna í mun til rørslu.

Nógv vóru fólkini, ið nýttu Útivikuna at ganga til arbeiðis ella til at røra seg meira enn vanligt. Og vit vóru ovfarin av undirtøkuni, Útivikan fekk millum fyritøkur, kommunur og í miðlunum. Tað gleðast vit um.

Onkrar kritiskar røddir vóru eisini, ið fýltust á, at ov nógv verður prátað um tað, at røra seg, og at tiltøkini venda sær serliga til fólk, ið longu íðka onkran ítrótt. Henda kritikk takka vit eisini fyri og taka hann við í eftirmetingina.

Fólkaheilsuráðið hevði ætlað at skipa fyri einari matpakkakonsert, meðan Útivikan var. Einari ókeypis konsert, har fólk skuldu ganga eitt petti fyri at koma fram og hava matpakka við. Veðrið var tó ikki til vildar, og tískil varð henda konsert av ongum. Ætlanin er, at konsertin verður seinni í summar.

***Fólkaheilsuráðið***

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.